# Anand heimsmeistari í talvi

Síðstu vikurnar hevur heimsmeistarakapping í talvi verið í Meksiko býi. Her hava átta teir sterkastu telvararnir í heiminum telva um heitið sum heimsmeistari, og vinnarin av kappingini gjørdist indarin, Vishwanathan Anand. Anand tapti einki av teimum 14 talvunum í kappingini, og endaði ovastur við níggju stigum. Á øðrum plássi var fyrrverandi heimsmeistarin, Vladimir Kramnik, við 8 stigum, meðan Boris Gelfand endaði á triðja plássi eisini við átta stigum. Við sigrinum gjørdist Anand fyrsti indiski heimsmeistarin í talvi nakrantíð.



# Nýtt heimsmet á Marathon-teininum

Um vikuskiftið bleiv nýtt heimsmet sett á Marathon-teininum, tá Berlin Marathon var á skránni. Tað var heimskendi ethiopiski rennarin, Haile Gebrselassie, sum setti nýggja heimsmetið við tíðini 2:04.26 tímar. Við hesum skar Gebrselassie 29 sekund av gamla metinum, sum eisini bleiv sett í Berlin fyri seks árum síðani. Haile Gebrselassie heldur annars, at hann sjálvur kann koma undir 2 tímar og 3 minuttir einaferð, men hann metir eisini, at rennarar í framtíðini fara at renna marathon teinin undir tveimum tímum.

# H71 rann KÍF um koll

**H71 fekk eina avbera góða byrjan upp á nýggja kappingarárið, tá teir vunnu sannførandi á KÍF. Serliga skjótu mótálopini hjá hoyvíkingum góvu kollfirðingum stórar trupulleikar**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eitt slag av eini lokaluppgerð, tá ið KÍF tók ímóti H71 leygardagin. Ikki tí at Kollafjørður og Hoyvík hava beinleiðis nakað við hvørt annað at gera, men KÍF og H71 spældu í fleiri ár í somu høll, og eftir hetta hava dystirnir millum feløgini ofta verið bæði góðir og spennandi.

Dysturin leygardagin var tó kanska ikki av teimum mest spennandi, einamest tí H71 tóktist hava rættiliga gott tamarhald á heimaliðnum gjøgnum stórar partar av dystinum.

## Mótálop var vegurin

Tað vóru gestirnir úr Hoyvík, sum løgdu betur fyri leygardagin. Eftir at liðini fyrstu minuttirnar høvdu fylgst hampiliga væl, var tað H71, sum setti seg á dystin. Við skjótum og góðum spæli løgdu teir ferð aftan á ferð trýst á kollfiðringarnar, og hesir tóktust fyrstu løtuna vera ovfarnir av skjóta spælinum hjá H71.

Serliga var tað skjótu mótálopini, sum KÍF ikki megnaði at steðga, og her var Dánjal Tórgarð ein góður maður fyri H71 henda dagin.

Tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin, førdi H71 heili 8-3, men brádliga raknaði KÍF við. Nú tóktust teir hóma hvønn veg tað bar, og spakuliga byrjaði spælið hjá teimum at gerast betri. Teir fingu eisini eitt mál og annað fyri, og áðrenn nakar visti av, hevði KÍF javnað til 10-10, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Nú mundu teir flestu av heimaáskoðarunum vænta, at KÍF var komið ordiliga í gongd.

## H71 avgjørdi

Men góða gongdin hjá kollfirðingum undan steðginum helt ikki fram, tá teir komu út til seinna hálvleik. Í staðin var tað aftur H71, sum setti seg á dystin, og hesa ferð lótu teir ikki KÍF koma aftur í aftur.

Eftir fimm minuttum høvdu gestirnir aftur vunnið sær eina leiðslu upp á trý mál, og sjálvt um KÍF royndi at svara aftur, so komu teir ongantíð upp aftur á javnleikin eftir hetta. Um miðjan seinna hálvleik var enn bert eitt mál á muni millum liðini, men so skoraði H71 fimm ferðir á rað og avgjørdi harvið dystin.

Síðstu løtuna royndi KÍF at fara út at verja, og teir fangaðu eisini bóltin í fleiri umførum. Munurin kom eitt skifti niður á tvey mál, men tá so H71 skoraði aftur fall endaliga avgerðin, og sostatt vann H71 ein uppibornan 27-24 sigur, sum var grundaður á gott og skjótt hondbóltsspæl.

Við hesum hevur unga manningin úr Hoyvík við nýggja venjaraparinum fingið eina sera góða byrjan upp á nýggja kappingarárið.



*KÍF hevði stórar trupulleikar við skjótu og góðu mótálopunum hjá H71, og við hesum á odda vann H71 ein uppibornan sigur, tá teir vitjaðu í Kollafirði.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Góð byrjan tryggjaði sigurin

**Neistin fekk eina flúgvandi byrjan upp á kappingarárið, tá teir vunnu á vestmenningum í fyrsta dystinum. Sigurin bleiv grundlagdur fyrstu sjey minuttirnar, tá Neistin førdi 7-0**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin skuldi nýggi venjarin hjá Neistanum, vestmenningurin Ingi Olsen, fyrstu ferð standa á odda fyri liði sínum í landskappingini. Og mótstøðuliðið í fyrsta dystinum var einki minni enn gamla felagið hjá Inga, VÍF, og tí var sjálvsagt lagt upp til ein spennandi dyst í høllini á Hálsi.



*Neistin fekk eina flúgvandi byrjan upp á kappingina, tá teir vunnu ein uppibornan 4-mála sigur á gestunum úr VÍF leygardagin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fantastisk byrjan grundlegði sigurin

Ikki kann sigast annað enn, at nýggi venjarin hjá Neistanum fekk eina dreymabyrjan í fyrsta dystinum. Eftir bert sjey minuttum hevði Neistin við sera góðum og skjótum spælið lagt seg á odda heili 7-0, og tí sá tað longu nú ógvuliga tungt út hjá gestunum úr VÍF.

Men VÍF hevur altíð verið kent fyri at hava ein góðan vilja, og hesin kom teimum eisini til góðar eftir trilvandi byrjanina. Spakuliga ótu teir seg inn á Neistan, og um miðjan fyrra hálvleik vísti talvan í høllini 9-5, so eftir bert átta minuttum hevði VÍF minka munandi leiðsluna hjá Neistanum, so nú var alt aftur púra opið.

Og VÍF helt fram við góða spælinum. Eitt skifti undan steðginum var munurin heilt niðri á einum máli, men tá Neistin so fekk síðsta málið í fyrra hálvleiki vóru tvey mál á muni, tá liðini komu út til seinna hálvleik.

## Neistin dró frá

Tað gingu bert tveir minuttir av seinna hálvleiki, so hevði VÍF javnað, og nú var lagt upp til ein sera spennandi seinna hálvleik, men soleiðis bleiv ikki.

Eftir útjavnandi málið hjá vestmenningum tók Neistin yvir aftur, og støðugt øktu teir nú um leiðsluna. Sjálvt um byrjanin upp á seinna hálvleik ikki var eins vánalig hjá VÍF sum byrjanin upp á fyrra hálvleik, so var tað tó nú, at dysturin bleiv avgjørdur. Eftir einum knøppum korteri var Neistin aftur framman fyri við seks málum, og nú var spenningurin so at siga farin úr dystinum – helst tí at VÍF hevði brúkt so nógva orku eftir keðiligu byrjanini.

VÍF royndi tó at kempa seg inn aftur í dystin síðstu 10 minuttirnar, men ov seint var. Endin var, at Neistin vann dystin 28-24, og eftir dystin kann bert staðfestast, at byrjanin upp á báðar hálvleikirnar gjørdist avgerandi. Her var Neistin nógv betri enn VÍF, og tí bleiv ov tungt hjá vestmenningum at koma aftur móti endanum.